Poul kennir ikki Føroya søgu

sigur býráðsformaðurin í Klaksvík um partamann sín í Havn. Poul Michelsen er komin válandi úr Tjóðveldisflokkinum, yvir Framburðsflokkin og á ta tryggu fólkaflokstaburettina, sigur Jógvan við Keldu.

Býráðsformaðurin í Klaksvík, fólkafloksmaðurin Jógvan við Keldu, finst harðliga at partamanni sínum, Poul Michelsen, býráðsformanni í Havn í Dagblaðnum í gjár. Jógvan við Keldu finst at, at Poul Michelsen er farin út umalt mark.

Asnaspørkini hjá Poul hava ikki trotið til floksfelagar, og um hetta kemur at kosta Fólkaflokkinumatkvøður til eitt komandi val uttan fyri Havnina, leggur Poul Michelsen einki í. Hetta er av góðum grundum, heldur Jógvan við Keldu.

Um politisku fortíð Poul Michelsens sigur býráðsformaðurin í Klaksvík m.a. at Poul Michelsen er komin válandi úr Tjóðveldisflokkinum, yvir Framburðsflokkin og á ta tryggu fólkaflokstaburettina.

— Heldur ikki tekur hann seg aftur í at geva stjórnartíðini hjá fyrrverandi borgarstjóra og partamanni okkara Petur i Christiansen ólívssár, hesin, sum við ringvegaætlanum, útstykkingum m.a. á Hálsi, útbygdari byggideild og klókum íløgum, serstakliga í árunum 1976-80, syrgdi fyri, at Poul Michelsen fekk framtíðina setta fyri seg á silvurfati, sigur Jógvan við Keldu.

Kennir ikki Føroya søgu

Býráðsformaðurin í Klaksvík er sannførdur um, at partamaður hansara í Havn kennir ikki Føroya søgu. Tað, at Poul ikki kennir Føroya søgu, nýtist tær ikki at vera leingi saman við honum fyri at leggja til merkis, og tað kann lutvíst vera honum fyrigivið, sigur Jógvan við Keldu, men hann heldur tað vera ovboðið, at Poul Michelsen er so eigasørur sum hann er í kommunalari søgu, nú hann hevur verið í kommunalpolitikki í seks ár.

Samstarv millum kommunur

Viðvíkjandi samstarvi millum kommunur átti Poul Michelsen at verið seinasti maður at tosa um, heldur Jógvan við Keldu. Poul hevur eina kommunu, sum markar til Havnina, og tað er Argja kommuna. Samstarvið millum hesar kommunur er kent um alt landið, sigur býráðsformaðurin í Klaksvík.

Til seinast sigur Jógvan við Keldu í greinini í Dagblaðnum ígjár, at tað valla er nakar býráðsformaður í nøkrum høvuðsstaði í Norðureuropa, ið hevur tað so gott sum okkara, við ongum útjavningargrunni og hópin av almennum lønum og øllum teimum íløgum, ið standast av hesum.

Býráðsformaðurin í høvuðsstaði okkara átti tí at virkað á einum verdigari støði, heldur Jógvan við Keldu.

tór.-



Jógvan við Keldu skrivar:

Ólátaði borgarstjóri høvuðsstaðarins

Nu veit eg ikki, hvussu langt Poul Michelsen, býráðsformaður, ætlar sær út í hupidøsu skriving sini, men nevðugt verður við viðmerkingum til okkurt av tí, hann bæði hevur sagt og skrivað.

Asnaspørkini frá honum hava ikki trotið til floksfelagar, tað veri seg Svend Aage Ellefsen og harvið Fólkaflokkin í Vágum ella stjórnartíð Peter C. Christiansens borgarstjóra, hesin, ið legði rygg til eina stóra ringvegaætlan, útstykkingar á Hálsi, eina væl útbygda byggideild og hópin av klókum íløgum — serstakliga í árunum 1976 til 1980 — og við teimum setti fyri Poul framtíðina á silvurfati.

Men ovboðið er tað, at hann í útvarpinum, meðan eg var burturstaddur, av berum erpinskapi situr og gevur Føroya fólki skeivar og oundirbygdar upplýsingar um mína kommunu.

Í tíðli hann at nyta hetta politiskt, vóru onnur meiri høskandi, rætt og eyðkend dømi at taka til.

Jógvan við Keldu var hvassorðaður móti partamanni sínum í Dagblaðnum ígjár

FUT gevst ikki so

Fleiri tiltøk, um ikki frættist frá Landsstýrinum

Við nøkrum faum undantøkum var eingin livandi tónleikur í dansihølunum kring landið. Tey orkestrini, sum spældu, sjálvt um Føroya Undirhaldstónleikarafelag hevði biðið limir sínar um at lata vera, vóru ikki limir. Um tey kanska gerast limir, er ein onnur søga.

Føroya Undirhaldstónleikarafelag hevði aðalfund leygardagin. Tað man vera sjáldan, at nøkrum felag eydnast at fáa umleið 80 fólk at koma á aðalfund. Men tónleikararnir meina tað, at okkurt má henda, um teir skulu halda fram at spæla til dans, konsertir og veitslur.

Limirnir samdust um, at frættir felagið ikki úr Landsstýrinum, skulu meira umfatandi tiltøk gerast. FUT fer at samráðast við dansihøliseigararnar um at gera ein sáttmála, soleiðis at felagið kann virka sum fakfelag.

FUT ætlar eisini at fáa plátuvendararnar til limir. Tveir teirra vóru við á aðalfundinum, sigur Petur Mohr Reinert, formaður í FUT.

Við at gera meira umfatandi tiltøk, hugsa tónleikararnir um saman við dansihøliseigarunum og plátuvendarunum at leggja alt lamið eitt av teimum fyrstu vikuskiftunum.

FUT samtykti á fundinum leygardagin eisini at seta pengar í ein húsagrunn. Ynskið er stórt um at fáa eitt musikkhús.

Á skránni fyri fundin var eisini nevndarval. Niels Olsen bar seg undan afturvali. Nevndarlimir og tiltakslimir eru nú Petur Mohr Reinert, Mikkjal Øster, Bjarni Rubeksen, Hans Andor Johannesen og nývald Milson Zachariasen, Ingun Simonsen og Eyðbjørn Jacobsen. Nevndin hevur ikki skipað seg enn.

randi

Tað ber ikki til at keypa instrument og spæla til dans og konerrtir við teimum toll- og skattalógum, sum eru. Hetta hava undirhaldstónleikararnir roynt at sagt Landsstýrinum frá

